# Kommunufólk á kunningarferð í Danmark

## við Agenda 21 stovuni

## 14. – 19. Sept. 2008



*Á vitjan í Albertslund. Greitt verður frá hvussu nýtslan av grønu økjunum í býnum er við til at økja um trivnaðin hjá borgarunum.*

Myndir: Agenda 21 stovan og Karl Olsen

## Danmarkarferð

Í døgunum 14. – 19. September 2008  luttóku 7 fólk úr kommununum á kunningarferð í Danmark, sum Agenda 21 stovan skipaði fyri.

Í døgunum 15. – 17. September var luttikið á norðurlendsku ráðstevnuni “Nordic Sustainability Conference – One Small Step”, ið var hildin í Odense. Næstu dagarnir var vitja á Samsø og í Albertslund. Bólkurin var aftur í Føroyum 19. September.

## Mánadagur 15. – mikudag 17. September. Ráðstevna í Odense.

Ráðstevnan “One Small Step”, sum í ár var hildin í Danmark, er triðja norðurlendska av sínum slag um burðardygga menning. Áður er ráðstevnan hildin í Noreg (2006) og í Svøríki (2004).

Evnið fyri ráðstevnuna var klima, hvat vit kunnu gera fyri at minka um útlátið av CO2 og hvussu vit í Norðanlondum kunnu royna at laga okkum til veðurlagsbroytingarnar, sum fara at koma.

Á ráðstevnuni vóru fyrilestar og vóru luttakarnir eisini settir til arbeiðis í arbeiðsbólkum at arbeiða við framtíðar orkuspurninginum í Norðanlondum undir yvirskriftunum: *Visjónir, møguleikar og handlingar.*




*Á ráðstevnuni vóru framløgur og verkstovur á skránni. M.a. hevði danska altjóða heilivágsfyritøkan Novo Nordisk eina framløgu um teirra tiltøk at minka um útlátið av CO2 frá teirra virksemi ymsastaðni í heiminum.*



*Føroyskir luttakarar saman við íslendsku luttakarunum á ráðstevnuni uttanfyri H.C. Andersens hus í Odense. Frá vinstru síggjast m.a.: (3) Stefán Gíslason, Leiðari á Agenda 21 skrivstovuni í Íslandi, (7) Karl Olsen, Borgarstjóri í Vestmanna, (9) Eli Fredriksen, Borgarstjóri í Porkeri, (12) Niclas Hentze, Borgarstjóri í Sumba og (13) Danjal Johan Lisberg, Bygdaráðslimur í Sumba.*

Sí meira um ráðstevnuna á: http://www.odense.dk/WEB1/onesmallstep.aspx

## Hósdagur 18. September.

Ferðalagið var á Samsø, sum liggur í Kattegat millum Jútland og Sælland, hósdagin 18. september. Á Samsø búgva á leið 4000 fólk og er kommunan ein av teimum minstu í Danmark.

Høvuðsvinnan á oynni er landbúnaður, men seinastu árinini er oyggin vorin heimskend sum "rein-orku-oyggj". Øll orka ið verður nýtt á oynni kemur frá alternativun orkukeldum, tvs. ikki frá olju ella koli, og útflytir oyggin eisini hesa reinu orku til restina av Danmark.

Fyrrapartin var vitjað hjá kommununi har greitt var frá um hvussu arbeitt verður við Agenda 21 á oynni og kunnað var eisini um hvussu kommunan á teknisku síðuni fyriheldur seg t.d. til uppsetan av smáum vindmyllum, eitt mál sum hevur verði frammi her heima í seinastuni.

Seinnapartin var vitja á Energiakademiet, sum er stovnur ið arbeiðir við orkuráðgeving til borgarar á oynni og er primus motor í arbeiðinum at gera Samsø nettoútflytara av reinari orku.



*Á vitjan á Samsø. Fra vinstru: Fríðbjørg Næs Joensen, Tórshavnar kommuna, Karl Olsen, Vestmanna kommuna, Danjal Johan Lisberg, Sumbiar kommuna, Niclas Hentze, Sumbiar kommuna, Søren Hermansen, Energiakademiet á Samsø, Annika Berg, Tórshavnar kommuna, Eli Fredriksen, Porkeris kommuna og Søren Stensgaard, Samsø kommuna.*



*Søren Hermansen, leiðari á Energi Akademiet á Samsø, greiður okkum frá hvussu fjarhitaskipanin á Samsø virkar. Á hesum verkinum verður hálmur brendur og orkan nýtt at hita húsarhald á oynni. Brenning av hálmi verður roknað sum CO2 neutralt, tí at tað CO2, sum verður til av brenningini, hava kornaksini longu tikið úr luftini tá tey vuksu.*



*Eitt kanadiskt sjónvarpslið vóru saman Søren Hermansen og føroyingunum runt á Samsø hendan dagin. Myndirnar skuldu nýtast til ein kanadiskan dokumentar um orkuoynna Samsø. Her hyggja vit at vindmyllum.*



*Sólin rísur í eystri. Mynd tikin av ferjuni frá Samsø ávegis til Kalundborg hagan farið var víðari til Albertslund á Sællandi har næstu vitjanirnar vóru.*

## Fríggjadagur 19. September. Vitjan í Albertslund

Albertslund kommuna liggur í høvuðsstaðarøkinum vestan fyri Keypmannahavn og er ein av miðalstóru kommununum í Danmark. Har búgva á leið 30.000 fólk.

Kommunan er serlig á tann hátt at eitt rættuliga stórt lutfall av íbúðunum í býnum (61 %) eru almennar og nógvar av hesum leiguíbuðir. Hetta hevur við sær at fólk búgva í stórum almennum íbúðarbyggingum har upp til fleiri túsund fólk kunnu búgva.

Fyrrapartin var vitja í íbúðarbyggingini "Hyldspjældet" har 4000 fólk búgva. Her hava íbúgvarirnir, saman við kommununi, gjørt eina rúgvu av umhvørvistiltøkum at minka um útlátið og at betra um trivnaðin hjá íbúgvunum. Nevnast kann t.d. tiltøk sum skiljan av ruski, at gera grøn økir og nýtsla av solorku v.m.

Í Albertslund var eisini vitja á Agenda Centret, sum er lokala Agenda 21 skrivstovan, har kunnað var um hvussu skrivstovan, saman við kommununi, arbeiðir við at skipa Agenda 21 arbeiðið í Albertslund.



*Povl Markussen frá Agenda 21 skrivstovuni í Albertslund greiðir frá um umhvørvistiltøkini í íbúðarbyggingini Hyldespjældet. Frá vinstru síggjast: Bergmann Finnsson, Agenda 21 stovan, Eli Fredriksen, Danjal Johan Lisberg, Povl Markussen, Agenda 21 skrivstovan í Albertslund og Fríðbjørg Næs Joensen.*



*Á endurnýtsluplássinum í Hyldespjældet. Her ber til at koma við lutum ið kunnu endurnýtast av øðrum borgarum, t.d. leikur o.t.l. Eisini verður rusk og burturkast frá húsarhaldunum flokka her. Hvør húsarhald hevur harumframti møguleika at gera sankutøð burturúr teirra lívrunna ruski.*



*Eitt serligt stað til børnini, eitt "Harry Potter spælipláss", í Hyldespjældet. Nógv verður gjørt burturúr fyri at børnini skulu trívast.*